# Landsstýrið skapar ótta

**– Landsstýrið roynir at skapa ótta millum almennu starvsfólkini, og tí spyrji eg, um hetta er byrjanin til tað góða samfelagið í 2015, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, um útspælið hjá landsstýrinum í sáttmálasamráðingunum við fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum**

SÁTTMÁLAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Vit eru langt úti, tá ið løgmaður og landsstýri tosa um frían samráðingarrætt, men í grundini gevur okkum valið millum pest og kolera.

Tað sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, eftir at eitt samt landsstýrið hevur gjørt av, at lønarkarmurin hjá tí almenna skal ikki vaksa næsta ár. Hetta verður gjørt greitt, júst sum samráðingarn um nýggjar sáttmálar byrja á almenna arbeiðsmarknaðinum.

– Landsstýrið roynir at skapa ótta millum almennu starvsfólkini, og tí spyrji eg, um hetta er byrjanin til tað góða samfelagið í 2015.

– Mikudagin byrjaðu vit samráðingarnar við Lønardeildina, men samstundis skjóta løgmaður og landsstýrið við spørkum úr sínum skjótgravum, og teir skjóta bæði eftir okkum og sínum egna fólki, sigur Gunnleivur Dalsgarð.



*– Allar samráðingar eru truplar, men eg havi ikki fyrr upplivað, at landsstýrið á hendan hátt roynir at skapa ótta millum okkara limir við at hótta við uppsøgnum, um tað verður ein lønarvøkstur í sáttmálasamráðingunum, sigur Gunnleivur Dalsgarð*

### Vónar at tað eru lótir

Formaðurin í Starvsmannafelagnum sigur seg ikki áður hava upplivað eina slíka støðu, sum nú er íkomin.

– Allar samráðingar eru truplar, men eg havi ikki fyrr upplivað, at landsstýrið á hendan hátt roynir at skapa ótta millum okkara limir við at hótta við uppsøgnum, um tað verður ein lønarvøkstur í sáttmálasamráðingunum, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

– Eg hevði ikki trúð, at Føroya løgmaður vildi verða við til hetta, og tað eri eg mest sjokeraður yvir. Men eg vóni, at hetta eru lótir, og vit fara at gera eina roynd at samráðast um nýggjan sáttmála, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum.

# Minni innflutningur

**Fyrstu fimm mánaðirnar í ár innflutt føroyingar vørur fyri 90 milliónir minni enn somu tíð í fjør. Tað er ein minking á 6 prosent, og minkingin stavar serliga frá minni innfluttum vørum til framleiðslu**

INNFLUTNINGUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Føroyingar innfluttu vørur fyri 90 milliónir krónur minni fyrstu fimm mánaðirnar í ár samanborið við somu tíð í fjør.

Virðið á innflutt vørunum fyrsta partin av árinum var 1,4 milliard krónur, og tað er seks prosent minni enn somu tíð í fjør.

Føroyingar innfluttu nógv minni av vørum til framleiðslu í teimum ymsu vinnunum – byggivinnuni, fiskivinnuni, alivinnuni og øðrum vinnum. Minkingin í hesum vørubólkinum er heili 17 prosent samanborið somu tíð í 2004. Eisini tá ið talan er um maskinur til framleiðslu er innflutningurin nógv minkaður – heili 24 prosent.

Eisini innflutningurin til húsarhaldsnýtslu minkaði nakað fyrstu fimm mánaðirnar í ár. Innflutt var fyri 11 milliónir minni í húsarhaldsvørum, og tað er ein minkin á tvey prosent.

Tað er eisini vøkstur í onkrum innflutningin. Føroyingar innflutt fyri sjey milliónir meira í persónsakførum, og tá talan er um kyndingarolju er talan um ein vøkstur á 53 prosent. Hetta kemst av, at oljuprísurin er nógv hækkaður seinasta árið.

# Arbeiðið í Norðoyatunlinum gongur væl

**Tað er nógv, sum talar fyri, at Norðoyatunnilin kann verða liðugur áðrenn tíðina, men nú verður farið undir eitt arbeiði, sum verður avgerandi fyri tíðarætlanina**

TUNNIL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Síðani Norðoyatunnilin varð skotin ígjøgnum tann 25. juli, hevur arbeiðið í tunlinum gingið væl. Nú snýr tað seg um alt annað enn at bora og spreingja. Arbeitt verður støðugt við at gera sjálva vegbreytina lidna og leggja rørleiðingar, og nú manglar hálvur annar kilometrar at asfaltera.

– Enn er tann almenni upplatingardagurin hálvur august næsta ár, men tað er nógv, sum talar fyri, at tunnilin kann lata upp í mei mánaði. Men enn hava vit ikki broytt tann offisiella dagin, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í P/F Norðoyatunlinum.

Hann sigur, at nú byrjar arbeiðið við at vatn- og frosttryggja tunnilin, og hetta arbeiðið er avgerandi fyri tíðarætlanina. Gongur hetta arbeiðið væl, kann upplatingin framskundast, men tað er ov tíðliga at siga tað fyri vist enn.



*Arbeiðið í Norðoyatunlinum gongur støðugt fram, og tað er sannlíkt, at Norðoyatunnilin kann lata upp í mai mánaði. Almenni upplatingardagurin er tó framvegis hálvan august næsta ár*

### Eingin gjaldsstøð uttanfyri

Arbeiðið við Norðoyatunlinum umfatar eisini at gera atkomuvegir til tunnilin báðu megin fjørðin, og arbeiðið at gera vegirnar lidnar byrjar nú. Bæði í Klaksvík og í Leirvík eru tað vegastrekki, sum skulu gerast liðug næstu mánaðirnar.

Tað verður eingin gjaldsstøð bygd uttan fyri tunnilin, tí ein nýggj skipan verður gjørd inni í sjálvum tunlinum. Tað verður ein skrásetingarstøð, sum byggir á sama prinsipp sum í Vágum, har bilarnir koyra uttan at steðga fyri at gjalda ella fáa rokning.

Norðoyatunnilin hevur einar 20 mans til arbeiðis, og harafturat koma aðrir veitarar, sum arbeiða í og kring tunnilin.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

ÚTSØLAN ENDAR MÁNADAGIN



68,-
T-Shirts, stórar støddir



Bikini
í svørtum - bláum
118,-

Brúsuforhang
ymisk mynstur
118,-

BH
68,-
198,-

og mangt mangt annað

VÆLKOMIN INN Á GÓLVIÐ

Dr. Jacobsensgøta 21
Tel. 31 53 15

Skálabúðin

Sosialurin 341800